# Skurðviðgerð fyri forhúðstronga

Tú kanst vænta nakað av pínu teir fyrstu dagarnar eftir skurðviðgerðina. Neyðugt kann vera at taka pínustillandi heilivág, t.d. Paracetamol, 1 gr. í mesta lagi 4 ferðir um samdøgrið, ella annan hondkeypsheilivág.
Tú fært eina tubu frá okkum av lokaldoyvandi kremi, sum tú kanst nýta áðrenn og aftaná tú hevur kasta tær av vatninum, og um tað svíður í sárinum.
Tað er ikki óvanligt at tað hovnar um sárið, men hetta hvørvur uttan viðgerð.
Tað tú sjálvur kanst gera:
Til at fyribyrgja at tað hovnar um skurðin, legg penis upp á búkin tað fyrsta samdøgrið.
Sárið er seymað við sjálvupploysiligum tráði, og eru hesir ikki horvnir eftir 14 døgum, far so til kommunulækna.
Halt sárið reint, skola við lunkaðum vatni í 1-2 minuttir dagliga ta fyrstu vikuna.
Rátt verður frá at hava samlegu ella onanera fyrstu 3 vikurnar.




Vinarliga
Starvsfólkið á Skurðdeplinum

Landssjúkrahúsið

tel 304500, www.ls.fo